# Havnar Bio

kall Coca-Cola

UMMÆLI;

# Cinderella Man: – Ein kjansur afturat til amerikanska dreymin

*Kom at hugsa um hugtakið um amerikanska dreymin tá eg sá filmin »Cinderella Man«, eftir leikstjóran Ron Howard (»A Beautifull Mind«). Hesin tankin um at øll, um tey gera eitt avrik skulu fáa ein annan kjans*

FILMSUMMÆLI
*Kim Simonsen*



Amerikanarnir hava altíð gjørt góðar boksifilmar. Kom at hugsa um »Rocky«, »Raging Bull«, »Millon Dollar Baby« og »Hurricane«. »Cinderella man« er ein boksifilmur í traditiónini frá Rocky, har Rocky Balboa, sum er ein bumsur, sleppur at berjast móti Apollo Creed. Besti Rockyfilmurin er hin fyrsti frá 1976. Filmurin snýr seg eisini, sum »Cinderella Man«, um kærleika.

Rocky vann tríggjar Oscars í 1976, og helst kemur »Cinderela Man« at vinna fleiri eisini.

Í løtuni er tað ein móti at gera boksifilmar. Clint Eastwoodsa »Million Dollar Baby«, er ein av hesum veruliga góðu boksifilmunum (nú á DVD), men her er tað ein kvinna, ið er boksari. Tað sum er so ótrúliga gott við filminum hjá Eastwood er, at hann og Morgan Freeman spæla við. Freeman er ein av heimsins bestu sjónleikarum. Vit sóu teir spæla saman í »Unforgiven« hjá Eastwood, ið er besti westernfilmurin nakrantíð. Hann hevur eisini spælt í tí ótrúliga góða »The Shawshank Redemption« (En verden udenfor) frá 1994.

## Working class hero

»Cinderella Man«, gongur fyri seg í USA fyrst í teimum ríku 20'unum, síðani í teim vónleysu kreppuárunum í 30'unum, tá 15 milliónir fólk vóru arbeiðsleys, og alt samfelagið støðgaði.

Hetta va, tá fólk savnaðust framman fyri útvarpinum, sum Woody Allen so fínt lýsti hesa tíð í filminum »Radio Days«.

Søgan byggir á veruleikan og snýr seg um James J. Braddock (Russell Crowe), ið er ein falleraður boksari, sum tó endar við at berjast móti heimsmeistarinum í tungvekt Max Baer.

At byrja við eru vit í 1920'unum. James Braddoc er ein lovandi boksari, sum ongantíð hevur verið sligin í gólvið. Braddoc er tó ein friðarligur maður, giftur og eigur trý børn. Konan Mae (Renée Zellweger - »Bridget Jones«, »Chicago« & »Jerry Maguire«) orkar ikki at hyggja, tá maðurin boksar. James forvinnur væl av peningi, ið hann setur í m. a. eitt taxafelag.

## Ein vónleys støða

Seinni fer at ganga illa. James verður raktur av ringum tíðunum. Depressjónin í 30'unum hevur lagt ein tungan skugga oman yvir alt samfelagið. Húsið verður selt, og einki arbeiði er at finna. Hann kann illa boksa meiri, tí hann hevur brotið hondina trý ymisk støð. James byrjar at tapa innan nevaleikin. At enda gongur so illa, at Nevaleikarafelagið tekur loyvið frá honum. Nú er James illa fyri. Við brotnari hond skal hann forsyrgja konu og trimum børnum við at arbeiða sum lossingarmaður á kaiini.

Hetta er hin besti parturin av filminum. Tað er eingin endi á eymjúkingunum, ið James og konan uppliva. Tey eru at enda noydd at senda børnini burtur, so onnur skulu taka sær av teimum. Tá fær James nóg mikið, hann fer at biða um forsorgarhjálp. Hann endar eisini við at bidda pening frá gomlu boksipromotarunum. Gamli fyriskiparin Joe Gould (Paul Giametti, kendur frá m. a. »Sideways«, »American Splendor« og »Storytelling«) tekur synd í honum og vil hjálpa honum. Hann bjóðar honum enn ein nevaleik, sum Gould roknar við, at hann fer at tapa, men James vinnur sjálvandi. Við teim fáu pengunum hann hevur vunnið frá hesum nevaleikinum, fer hann á arbeiðsloysiskontórið fyri at gjalda hvørja krónu aftur hann hevur fingið.

## Hetja í einari vónleysari tíð

Leikstjórin Ron Howard, ið er ein av teimum stóru mainstream leikstjórunum í Hollywood í dag, hevur valt at brúka eina veruliga søgu um legenduna Jim Braddoc, ið gjørdist ein hetja millum vanlig fólk í 30'unum. Hann boksaði ikki fyri at gerast meistari, men fyri at kunna geva konu og børnunum mat í munnin.

»Cinderella Man« er eisini søgan um sterka kærleikan millum konuna Mae og James, og hvussu tey lærdu at halda enn meiri saman, tá tíðirnar eru ringar.

## Working class hero

13. juni 1935 bardist Braddock, móti heimsmeistarinum Max Baer, ið tá var ein blandingur av Mohammed Ali og Mike Tyson. Hann var kendur fyri at hava dripið tveir menn í ringinum.

Baer verður í filminum lýstur sum eitt bølmenni, men í veruleikanum var hann ein vakur og sjarmerandi maður.

Fólkið elskaði hendan Braddoc, lossingarmannin, ið fekk enn ein kjans. Hann gav fólki eina vón, tá amerikanska samfelagið lá á knøunum. Hesin filmurin snýr seg, sum flest allir Hollywoodfilmar um sentimentala amerikanska dreymin. At vit øll kunnu gera eitt avrik. At tað er gjørligt at bróta sosialar umstøður. Tá sjálvt ein fátækur lossingarmaður í 30'unum kann, so kanst tú eisini. Hetta er av sonnum dreymaverksmiðan Hollywood.

Filmurin gloymir tó ikki heilt øll tey navnleysu, svongu og gloymdu, ið ongantíð sóu annað enn teirra dreym bresta. Hugsa vit okkum um, so er holið í amerikanska dreyminum stórt, tí nógv detta burtur millum og glatast, meðan tey leita eftir dreyminum. Samanumtikið er hetta tó ein filmur, ið er verdur at hyggja eftir.

Av seks størnum fær hann fimm.

******

Cinderella Man, USA 2005. Ron Howard. 145 minuttir. Frumframsýndur kring alt Danmark og í Havnar Bio Fríggjadagin 16. september.

Leikandi:

| | |
|---|---|
| Jim Braddock | Russell Crowe |
| Mae Braddock | Renée Zellweger |
| Joe Gould | Paul Giametti |
| Max Baer | Craig Bierko |

TÍÐIRNAR:

**Stórt úrval av DVD-filmum til sølu**




## Cinderella Man — *FRUMSÝNING*

| | | | |
|---|---|---|---|
| Fríggjadag | 16.09 | kl. 20.00 | kl. 23.00 |
| Leygardag | 17.09 | kl. 20.00 | kl. 23.00 |
| Sunnudag | 18.09 | kl. 19.30 | kl. 22.30 |




## Kung Fu Hustle — *FRUMSÝNING*

| | | |
|---|---|---|
| Fríggjadag | 16.09 | kl. 21.30 |
| Leygardag | 17.09 | kl. 21.30 |
| Sunnudag | 18.09 | kl. 20.30 |




## The Amityville Horror

| | | |
|---|---|---|
| Fríggjadag | 16.09 | kl. 23.30 |
| Leygardag | 17.09 | kl. 23.30 |
| Sunnudag | 18.09 | kl. 22.45 |




## The Skeleton Key

| | | | |
|---|---|---|---|
| FFríggjadag | 16.09 | kl. 19.15 | |
| Leygardag | 17.09 | kl. 19.15 | |
| Sunnudag | 18.09 | kl. 18.15 | *Seinasta sýning* |




## Herbie

| | | |
|---|---|---|
| Fríggjadag | 16.09 | kl. 17.00 |
| Leygardag | 17.09 | kl. 17.00 |
| Sunnudag | 18.09 | kl. 16.00 |




## Madagascar

| | | | |
|---|---|---|---|
| Fríggjadag | 16.09 | kl. 18.00 | |
| Leygardag | 17.09 | kl. 16.00 | kl. 18.00 |
| Sunnudag | 18.09 | kl. 15.30 | kl. 17.30 |

## Komandi filmar

## 40 year old virgin — *FRUMSÝNING*

Fríggjadag 23.09

## Charlie og Chokoladefabrikken — *FRUMSÝNING*

Fríggjadag 23.09

**www.bio.fo • Telefon 31 19 56**